

Hann hevur orsøk til at fegnast, nú tað eydnaðist at fáa starvsfólkini á innkrevjingardeildini til arbeiðis aftur
Savnsmynd

# Gott at tey sluppu aftur til arbeiðis

*Tað eydnaðist at finna eina semju millum Starvsmannafelagið og Toll- og Skatt, soleiðis at starvsfólkið á innkrevjingardeildini sluppu aftur til arbeiðis, men hon hevði við sær, at Starvsmannafelagið mátti viðganga at hava borið seg skeivt at*

SVEINUR TRÓNDARSON

Hon byrjaði tann 9. november 1999, ósemjan á innkrevjingardeildini á Toll- og Skatt. Og ikki fyrr enn tann 5. januar 2000 fóru tey aftur til arbeiðis.

Í næstan tveir samfullar mánaðir vardi ósemjan, sum í byrjanini snúði seg meira um smámál á eini deild, men sum við eitt gjørdist ein ósemja millum arbeiðsgevara og fakfelag um burturvísingar og annað.

Nú semjan er fingin í lag, eru báðir partar sjálvsagt nøgdir, men, sum tað sær út uttanífrá, so er bara ein partur av ósemjuni loystur. Tað er stríðið millum fakfelagið og arbeiðsgevaran, meðan innanhýsis ósemjan skal loysast av samstarvsbólkinum, sum gjørdist ein partur av semjuni.

### Tað var eitt mistak

Semjan hevur við sær, at Starvsmannafelagið viðgongur at hava gjørt eitt mistak í sambandi við ósemjuna á Toll- og Skatti.

Í semjuni stendur, at Starvsmannafelagið viðurkennir, at innanhýsistrupulleikar skulu viðgerast og loysast á staðnum millum leiðslu og starvsfólk, og at álitisfólk hevur ikki rætt til at boða til fundar í arbeiðstíðini móti boðum frá leiðsluni.

Gunnleivur Dalsgarð viðgongur, at felagið gjørdi eitt mistak í sambandi við fundin, sum varð í november, men hann staðfestir, at tað er rætturin hjá fakfelagnum, at blanda seg upp í eina ósemju á einum arbeiðsplássi.

– Tað hava vit skyldu til at gera, og tað fara vit sjálvsagt eisini at gera í framtíðini. Men tað var ikki rætt at gera tað, sum vit gjørdu tað í november, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum.

Tí leggur hann stóran dent á tann partin av semjuni, sum snýr seg um samstarvsnevndina.

– Sáttmálin ásetur møguleikan fyri slíkum samstarvsnevndum og tí var tað av sera stórum týdningi fyri okkum, at fáa júst tann partin við í semjuna, sigur Gunnleivur, sum leggur afturat, at ein slík samstarvsnevnd skal byrgja upp fyri, at slíkir trupulleikar stinga seg upp í framtíðini.

Gunnleivur Dalsgarð greiðir frá, at uppgávan hjá samstarvsnevndini verður at verða við í samskipanini av stovninum frameftir.

– Ætlanin er, at innkrevjingin skal flytast út økini, og samstarvsnevndin skal vera við í tilrættaleggingini av tí arbeiðinum.

### Hóttaninar afturtiknar

Tá Starvsmannafelagið kom upp í málið um trætuna á innkrevjingardeildini gekk bert lítil løta til álitisfólkini vórðu hótt við burturvísing. Ikki tí at felagið var komið uppí, men av tí at tey, sambært leiðsluni, høvdu forbrotið seg móti sáttmálanum.

Men nú semjan er gjørd, eru hesar burturvísingar afturtiknar allar sum ein. Og samstundis viðurkenna báðir partar hóttaninar, sum vórðu settar fram, samstundis sum eisini tær fella burtur.

Hjá Starvsmannafelagnum var tað eitt krav, at allar hóttaninar og burturvísingar vóru tiknar aftur og tí er formaðurin sjálvsagt fegin um, at tað eydnaðist.

– Tað sigur seg sjálvt, at vit kunnu ikki finna okkum í, at hava hóttanir hangandi yvir høvdinum á okkara starvsfólkum, og tað eri eg sjálvsagt nøgdur við, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

### Sjokeraður av Karsteni

Men hóast semja er gjørd, so er alt ikki bara dansur á rósum frameftir.

Útvarpið visti í gjár at siga frá Karsteni Hansen, at nú útleggingin av innkrevjingini kann fara fram, so merkir tað, at eini fýra ella fimm starvsfólk kunnu sparast.

– Eg haldi at tað er heilt ófatuligt av Karsteni, og eg eri sjokeraður, fyri at siga tað sum tað er. Eg haldi tað vera einastandandi løgið, at hann beint eftir eina drúgva ósemju fer út og sigur, at fimm størv kunnu sparast burtur. Hatta hevur hann ikki nevnt við einum tí einasta orði í sambandi við samráðingarnar sum verið hava seinastu tíðina, sigur Gunnleivur, sum ikki er sørt uppøstur, um framferðina hjá fíggjarmálaráðharranum.

Gunnleivur Dalsgarð heldur framferðarháttin verða løgnan, tí enn kennir eingin umfangi av einari útlegging av innkrevjingini og útleggingin er ikki í samsvari við metingina hjá starvsfólkunum á innkrevjingini.

– Tey meta, at tað eftir øllum at døma verður tørvur á teimum øllum somlum tá útleggingin er framd, og tí er tað heldur enn ikki nasadjarvt av fíggjarmálaráðharranum at skera ígjøgnum á henda hátt sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í starvsmannafelagnum at enda.

*Oddagrein í Politikken:*

## Ríkisfelagsskapurin er virðismikil

*Í oddagreinini í stóra danska blaðnum verður staðfest, at tað eru danir, sum missa mest, um føroyingar og grønlendingar gera av at fara úr ríkisfelagsskapinum*

SVEINUR TRÓNDARSON

Um dagarnar hevði danska blaðið Politikken oddagrein um ríkisfelagsskapin undir heitinum »Mod fremtiden«. Undirheitið er, at »vit missa nógv, um felagsskapurin verður uppløystur«.

Tónin í oddagreinini er sjáldsamur, tá hugsað verður um tónan, sum vanliga verður nýttur í donskum fjølmiðlum, tá skrivað verður um Føroyar - og Grønland fyri tann skuld.

Niðurstøðan í greinini er nevniliga, at tað er ein spurningur, um danir ikki missa meira fyri minni við bara at bíða eftir, at føroyingar og grønlendingar »rýma« úr ríkisfelagsskapinum.

### Skilligur loysingarhugur

Í byrjanini í oddagreinini verður staðfest, at danir tey fyrstu nógvu árini, vóru koloniharrar í báðum londunum, men at teir seinastu árini hava skift ham.

Heimastýrislógin hevur gjørt, at danska ávirkanin í londunum báðum er vorðin alsamt minni, hetta hóast, bæði londini fáa stórar fíggjarligar veitingar úr Danmark.

Kortini er uppstaðin ein skilligur loysingarhugur í londunum báðum. Her heima hevur sitandi landsstýrið sett sær fullveldi á korti og í Grønlandi hevur landsstýrið sett eina serliga sjálvsstýrisnevnd, sum skal hyggja at viðurskiftunum við Danmark.

Tí er eingin ivi um, at broytingar eru á veg í ríkisfelagsskapinum, og tí er tað, at greinaskrivarin rópar varskó.

### Tað blinda eygað

Hann heldur, at danir mugu viðganga, at broytingar eru neyðugar, og at tær eru á veg. Hann sigur:

– Higartil hava vit í navni tolsins sagt føroyingum og grønlendingum, at teir kunnu fara tá teir vilja, og vit hava so at siga vent ryggin til ein trupulleika, sum snýr seg um annað og nóg meira enn bara at spara nakrar milliardir krónur á fíggjarlógini hjá statinum.

Greinaskrivarin ger vart við, at samstundis sum danir søkja tættari tilknýti til størru londini í evropeiska felagsskapinum, vísa teir líkasælu tá tað snýr seg um ríkisfelagsskapin.

– Tað er ikki nóg mikið at spyrja hvat føroyingar og grønlendingar kunnu vinna. Vit hava skyldu til at gera upp, hvat vit missa, um teir norðastu partarnir av ríkisfelagsskapinum velja okkum frá, stendur í oddagreinini.

### Meira enn Nato-avsláttur

Her fer greinaskrivarin inn og gevur sítt svar upp á tað uppgerðina, sum nevnd er frammanundan. Hann vísir á, at fyri eitt stórt tal av dønum, sum í gjøgnum nógv ár, hava knýtt sterk bond til Føroya og Grønlands, er svarið púra greitt.

– Fyri teir, merkir ein uppløysn av ríkisfelagsskapinum, at teir missa ein stóran part av sínum samleika og ein stóran part av sínum møguleikum. Síggja vit burtur frá veruleikunum um danskan Nato-avsláttur, sum er goldin av grønlendskum veiðimonnum og føroyskum fiskimonnum, og frá møguligum oljuúrdáttum, so standa vit, sum filmurin um Barbaru so væl segði tað um dagarnar, øll sum taparar. Ikki í krónum og oyrum, men í lívsvirði.

Greinskrivarin setur her spurnartekin við, um danir, í hesum rationaliseringartíðum hava ráð til at missa eitt bindandi tilknýti til tvey lond, har lívið er so nógv, nógv øðrvísið enn tað er í Danmark.

– Hava vit ráð at missa dreymirnar um tað stóra ævintýrið fyri norðan og hava vit ráð til at missa tað salt, sum í gjøgnum fleiri ættarlið hevur verið úrslitið av tí samlívið okkara ólíku mentanir hava livað?

Hann svarar sjálvur!

– Er svarið nei, so er tað uppá tíðina at vit frá danskari síðu byrja at taka avleiðingarnar og hugsa um at finna eitt nýtt uppbyggjandi samstarv millum Føroyar, Grønland og Danmark. Eitt samstarv, sum kann bera inn í nýggju øldina. Men tað avgerð hvør dani sær ...



# HYGG & HOYR

Fríggjadagur 7. januar

# Eingin koyribreyt og tó

*Hóast Útvarp Føroya nú er givið við vælumtóktu »Koyribreytini«, so merkir hetta ikki, at sendingin er farin í gloymibólina*

JÁKUP MØRK

Fyri stuttum frættist, at væl umtóktu vertirnir í koyribreytini, Óla Jákup Rólantsson og Laila Jacobsen, ikki longur vera at hoyra í Útvarpi Føroya, og saman við hesum báðum røddum, hvarv eisini koyribroytin.

At siga at koyribreytin er horvin, er kanska at taka munnin í so fullan, tí hóast tey bæði ikki longur eru at hoyra í Útvarp Føroya, so koma tey framyvir at sita við mikrofonirnar hjá nýggja kappingarneyta Utvarpsins, Rás 2.



*Vertirnir í koyribreytini, Óla Jákup Rólantsson og Laila Jaobsen, sum nú eru farin undir at gera líknandi sendingar fyri Rás 2*

### Byrjað í dag

Óla Jákup Rólantsson kundi í gjár siga okkum frá, at tey í løtuni eru ferð við at gera eina líknandi sending á Rás 2, og fyrsta royndin fer í luftina í dag kl. 17.03.

– Tað ber ikki til annað, var svarið, tá vit spurdu Óla Jákup, um hann metir, at tað er neyðugt við einum ferðslutátti í útvarpinum.

Annars er at siga um sendingina, at vertirnir verða teir somu, sum vit kenna frá útvarpinum, umframt at tey bæði nú eisini fáa eitts sindur av hjálp frá Sonna Smith, hvørs rødd flestu føroyingar munnu kenna.

Hetta, at nýggj koyribreyt er á veg, man kennast sera gott hjá teimum, sum arbeiða fyri trygdini í ferðsluni her á landi. Fyri stuttum høvdu vit á hesum síðum eina samrøðu við Jón Kragesteen, leiðara á Ráðnum fyri ferðslutrygd, og orð hansara vóru tá, at eftir hansara tykki hevði koyribreytin ómetaliga stóran týdning fyri tað arbeiði og og ta upplýsing um ferðslu, sum ráðið roynir at fremja.

Sjálvur sigur Jón, at tað sjálvandi er at fegnast um, at nýggja rásin hevur tikið hetta stigið, men samstundis vónar hann, at Útrvarp Føroya framhaldandi fer at senda Koyribreytina, við tað at Rás 2 ikki røkkur um alt landið.

Eftir er bert at siga, at um tú ert millum teirra, sum plaga lurtað eftir koyribreytini, og ert millum teirra, sum hoyra rás 2, so er bara at stillað útvarpið á 102,0 fríggjadagin kl. 17.03.

## ÚTsjón - um loftmiðlar okkara



Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, skrivar

# Nýggjar tíðir við hugaligum boðskapi

Vanliga gera loftmiðlar okkara nógv burtur úr jóla- og nýggjárshalguni, og var tað eisini soleiðis hesaferð, og var tað í so máta heppið fyri undirritaða at eiga ummælaratørn farna árs-, aldar- og túsundárssskifti.

Útvarpið byrjaði so smátt at rógva fram undir tíðarskifti við afturlítandi ítróttarsendingum umframt eini sending 4. jólakvøld nevnd Quo vadis Føroyar (Hvagar gongur leiðin Føroyar?) har Skúvadal og Dam skiftu orð við ymisk fólk um framtíðarútlit føroyinga í komandi tíðum, eitt nú viðvíkjandi stjórnarviðurskiftum.

Bersøgin, kanska realistiskur og beinrakin ella kanska var hann bara sær sjálvum vant skemtingar-samur hesin H.D., tíðindamaður, tá hann setti stórt spurnartekin við førleika nútíðar føroyinga til yvirhøvur at kunna stýra sær sjálvum, tíansheldur fáa rímiligan rakstur á grindina, hesar neyðars 45.000 sálirnar.

Dømi eru mong um, at sum er fungerar mangt og hvat ikki nóg væl, og hetta hóast hægsta almenna útbúgvingarstøði, ein heilan riðil av almennum fulltrúum, frøðingum og ráðgevum, afturvið alskyns tøknifrøðiligum ísinkrammi at styðja seg til ella legitimatisera seg við, og kortini vísir áfallandi nógv seg kortini at kiksa í hesum fámenta, men annars mentaða samfelagi.

Annars legði útvarpið væl upp til árskiftið, bæði fram- og afturlítandi og hesa ferð meira spjatt yvir fleiri dagar, so ein fekk stundir at fylgja við og at sodna tilfarið so hvørt.

Nýggjársaftan kom »Spyr bara« sendingin afturíaftur, og er tað ein ótrúliga almennur lívsvísdómur, sum tað luttakarapanelið saman kann framleiða mestsum bert burtur úr sær sjálvum.

Hugleiðingarnar frameftir vóru hesaferð at seta Menniskjanslig virði fremri enn eitt nú tøkni, tøl og kaldan og mundi eg sagt beran cost-benefit.

Sama var eisini uppivið í nýársrøðu løgmans, sum mær hóvaði rímiliga væl, og sum mest líktist eini landsfaðirrøðu ella eini ópolitiskari forsetarøðu til almenningin.

SvF var gamlaárskvøld partvís øðrvísi enn vant. Sjálv nýárssendingin var forvitnislig. Gamaní vóru innsløgini ójøvn, og satt at siga skilti eg ikki reiðiliga nóg væl skemtið hjá tí annars so stuttliga Jákupi Weyhe, men tað bøtti so nakað um, at verturin Ólavur Rasmussen var so frálíka væl upplagdur og lyfti alla sendingina upp á eitt hátíðarligt og hugaligt støði.

Nýárskvøld sendu ÚF og SvF í felag fagnaðargudstænastu úr Dómkirkjuni fyri túsundárahaldinum fyri, at kristindómurin varð boðaður í Føroyum.

Eitt framúr væleydnað, virðiligt tvørkirkjuligt felags signal fyri túsundárahaldinum. Eitt greitt signal frá kirkjuni og øðrum kristnum samkomum her á landi um, at tær kortini hóast alt vilja standa saman um henda týðandi arv, sum hevur týtt, týðir og framvegis fer at týða so nógv fyri føroyingar, heilt í tráð við meting og nýársrøðu løgmans.

Bert spell at ikki allar samkomur vóru við, og einamest at størsta og virknasta frímeinigheitin (Brøðrasamkoman) sjálv hevði sett seg uttanfyri. Hvat í verðini hugsa teir fyri sær? Trúgva teir veruliga framvegis, at kristnin bert er komin higar til lands við teimum sjálvum, at teir eiga patent upp á kristintrúgv her á landi og hava einkarrættin til himmalin? Fati ikki, at ikki onkur av teimum hóast alt mongu uplýstu og at sær komnu í samkomuni ikki hava megnað at tikið í herðatoppin á teimum mest konservativu, ið eyðsýniliga hava avgerðina, at sýna minni sjálvgleði, sjálvhátíðarligheit og heimføði og heldur at rógva saman við øðrum kristnum í Føroyum um hóast alt felags søk.

Undir tí sera hátíðarligu fagnaðargudstænastuni sá eg fyri mær 1000 ára kristnanina í Føroyum sum ein 1000 ára gamlan andaligan eikibul við ymiskum viðkomandi og fjølbroyttum greinum, stórum sum smáum, ungum sum gomlum, har tó allar greinar vuksu á sama gamla, støðufasta eikibuli, men úti stóð so ein av egnum forfeingilsis- og sjálvsøknisávum. Tað var ikki neyðugt og kann koma teimum aftur um brekku, sum tíðir líða, og kristiligt samskifti og menning fer at økjast.

»Saman at standa var ei okkum givið«, og helst er tað eisini eyðkenni fyri okkum fámenta fólk í Føroyum. Kortini meti eg gjøgnum fjølmiðlar okkara hetta árs-aldar-, túsundáraskiftið verða greitt signalerað, at vit frameftir vilja royna at rógva saman trúarliga, á annan hátt mentunarliga og við størri samhaldsfesti at seta onnur menniskjanslig virði í hásætið enn bert karrátt cost-benefit fyrilit, tað, sum tímiliga, peningaliga og tøkniliga loysir seg og í løtuni, er uppi í tíðini fyri síðani at verða tveitt á køstin. Varandi menniskjanslig virði fram um tímilig farandi og skiftandi, og við hesum vil eg ynskja okkum øllum somlum alt gott framyvir.

ÚTsjón

Marna Jakobsen, Steintór Rasmussen, Annika Joensen og Eyðun Joensen skiftast um at skriva ÚTSJÓN